


# Fólkaríkasti partur av ríkinum kann hvørva

**Jógvan Hugo Gardar**

26.04.2015 - 16:49

Oljan.fo

Veðurlagsbroytingarnar kunnu, um ikki broyting kemur í, koma at broyta tann heimin vit í dag kenna. Fyri Ríkisfelagsskapin sum umfatar Danmark, Føroyar og Grønland, kunnu fylgjurnar vera at fólkaríkasti parturin, tað vil siga Danmark,má flyta til Føroyar og Grønlands.

Framskrivingarnar hjá Business Insider vísa nevniliga at um allur ísurin í heiminum smeltar, so hvørvur meginparturun av Danmark.

Business Insider hevur gjørt ein film sum vísir hvussu tað kemur at ganga, um allur ísurin smeltar. Og tað er ikki bara Ríkisfelagsskapurin sum má umskipast, tí heil lond og milliónabýir hvørva, um ísurin smeltar og havið hækkar einar 65 metrar.

*Filmurin hjá Business Insider sæst niðanfyri.*

Her sæst at meginparturin av Danmark hvørvur, og Holland er eitt av londunum sum fyrst vil hvørva í havinum. Og milliónabýurin London er eisini undir vatnskorpuni.

Hetta eru tó økir sum ikki eru so fólkarík, samanborið við onnur økir sum kunnu fara undri vatnskorpuna.

Í India vil allur Mumbai við sínum 18,4 milliónum íbúgvum hvørva. Tað sama ger Kolkata við sínum fimm milliónum íbúgvum. Men tað er einki ímóti Bangladesh, sum við sínum 163 milliónum íbúgvum vil hvørva heilt.

Aðrir býir í Asia sum kunnu hvørva heilt ella partvís eru Bangkok, Hong Kong og Ho Chi Minh-býurin.

Í Kina missa seks hundra milliónir fólk sín bústað, tí stórbýir sum Shanghai og Bejing vilja liggja undir vatnskorpuni.

Hóast hetta eru søgur sum kunnu ræða tey flestu, so hava vit enn tíð at gera broytingar og forða fyri at veðurlagsbroytingarnar gera at allur ísurin smeltar. Við gongdini í dag, so kemur tað at taka 5000 ár áðrenn allur ísurin í heiminum er smeltaður.



Kelda: Business Inside